# Topalov í serflokki

**Lokala stjørnan Veselin Topalov vann sannførandi sterku kappingina Mtel Masters í Sofia. Viswanathan Anand varð nummar tvey**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eitt øgiligt comeback. Frá at vera aftastur tá kappingin var komin í helvt, endaði Veselin Topalov eitt heilt stig fremstur tá avtornað varð.

Eftir fimta umfar vóru Vladimir Kramnik og Michael Adams á fyrsta plássi við trimum stigum hvør. Viswanathan Anand og Ruslan Ponomariov høvdu 2,5 stig og í botninum vóru Judit Polgar og Topalov við tveimum stigum.

Hevði Topalov eina fantastiska seinnu helvt - har hann fekk 4,5 stig av fimm - hevði Kramnik ein katastrofalan kappingarenda. Einans eitt stig av fimm møguligum fekk heimsmeistarin skavað saman og hetta gav honum eitt heldur pínligt aftasta pláss. Ófatiligt sum tað ljóðar, so endaðu Kramnik og Adams báðir aftastir, hóast teir lógu á odda tá kappingin var hálvrunnin.

## Offurvilji

Tá Topalov tapti ímóti Ponomariov í fimta umfari, væntaðu fá at hann fór at reisa seg somikið sterkt sum hann gjørdi. Ikki minst tí hann framanundan hevði lovað seg til at brúka einasta frídagin (eftir 5. umfar) til at skapa áhuga fyri telving í heimlandinum Bulgaria. Millum annað brúkti Topalov tað mesta av degnum uppá simultantelving.

Men sæð útfrá myndum frá hesum frídegi, tóktist tað sum Topalov veruliga hugnaði sær saman við viðhaldsfólkum sínum. Rokmikli frídagurin gav í øllum førum úrslit. Í sætta umfari niðurspældi hann Anand við vøkrum offrum og knappliga hevði Topalov samband við oddin.

Í sjeynda umfari hevði hann svarta fólkið ímóti Adams. Í miðspælinum hevði Adams lítlan fyrimun, men leikti síðani ein feil, og tað hevur ein ikki ráð til ímóti Topalov. Topalov telvaði hareftir við stórari megi og vann sannførandi endatalvið við sínum bispaparið ímóti róki.

Eftir ein spennandi javnleik í áttanda umfari ímóti Polgar, har Topalov enn einaferð offraði seg til aktivt spæl, var toppdystur á skránni móti Ponomariov. Ungi ukrainski telvarin hevði telvað sannførandi og lá uppiborið á deildum fyrsta plássi saman við Topalov undan seinastu tveimum umførunum. Men ímóti vælkoyrandi bulgaranum hevði hann snøgt sagt ongan møguleika. Topalov fór í eitt snarligt kongaálop við at offra ein rók og riddara longu í byrjanarspælinum. Eftir 30 leikir varð Ponomariov skák mátaður. Talvið er í blaðnum.

## Kramnik fyri skotum

Tá Anand leikti javnt í tíggjunda og seinasta umfari ímóti Polgar, var tað nóg mikið við javnleiki hjá Topalov í talvinum ímóti einum í løtuni illa telvandi Kramnik. Kramnik hevði tó ætlað sær at gera ein vørr og fór í eitt kongaálop, sum tó varð snøgt steðgað av oddamanninum.

Eftir eina spennandi støðu seint í miðspælinum, har Topalov hevði offrað ein kvalitet fyri væl betri støðu, bukkaði Kramnik ein riddara og gavst við brestin.

Sigurin gav Topalov eitt trygt fyrsta pláss við 6,5 stigum. Anand varð næstir í røðini við 5,5 stigum. Eftir kappingina hevur Topalov yvirtikið plássið hjá Anand sum ratingsterkasti telvarin í heiminum, nú Kasparov er givin á hægsta stigi. Umleið 2788 verður nýggja ratingtalið hjá Topalov, meðan Anand dettur niður á 2784.

## Endaliga støðan

| | | | |
|---|---|---|---|
| GM Topalov | Bulg. | 2778 | 6,5 |
| GM Anand | India | 2785 | 5,5 |
| GM Polgar | Ung. | 2732 | 5,0 |
| GM Ponomariov | Ukr. | 2695 | 5,0 |
| GM Kramnik | Russ. | 2753 | 4,0 |
| GM Adams | Eng. | 2737 | 4,0 |

## Talvið hesa vikuna

**Topalov (2778) - Ponomariov (2695)**
Mtel Masters (9), 21.05.2005

**1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 b6** Nimzoindiska byrjanin **4.g3 Ba6 5.b3 Bb4+ 6.Bd2 Be7 7.Ric3 0-0 8.Rc1 c6 9.e4 d5 10.e5** Ein teoretisk nýggjheit. Leikurin tykist logiskur og sterkur **10...Rie4 11.Bd3 Rixc3 12.Rxc3 c5 13.dxc5 bxc5 14.h4** Tendensiøsur leikur. Topalov fer eftir konginum **14...h6** Ponomariov svarar heldur bangin aftur við ivasum leikur, sum viknar um kongastøðuna **15.Bb1 f5 16.exf6 Bxf6 17.Fc2! d4 18.Rig5! Vakurt 18...hxg5 19.hxg5 dxc3 20.Bf4** Sera kalt telvað. Tað er hugsandi at svartur við røttum verjuspæli møguliga kann yvirliva, men í praktiskari telving er tað altíð torført at verja slíka veika kongastøðu, har øll síni fólk standa passivt á drotningasíðuni **20...Kf7 21.Fg6+ Ke7 22.gxf6+ Rxf6 23.Fxg7+ Rf7 24.Bg5+ Kd6 25.Fxf7! Fxg5 26.Rh7** Hóttur Fc7++ 26...Fe5+ 26...Fd8 verður svarað við Ff4+ og síðani Be4+ sum vinnur rókin og eisini talvið **27.Kf1 Kc6 28.Fe8+ Kb6 29.Fd8+ Kc6**



**Støðumynd eftir 29...Kc6**

**30.Be4+!** Ponomariov gavst orsakav av: 30...Fxe4 31.Fc7 checkmate **1-0**

Sosialurin

ÚTBJÓÐING

Norðskálatunnilin – tekniskar innleggingar

Við hesum verður arbeiðið at gera tekniskar innleggingar í Norðskálatunlinum boðin út í almenna lisitatión.

**Arbeiðið fevnir um:**
at gera veit, leggja sterkstreymskaðal og drenleiðing gjøgnum tunnilin, seta vega- og eftirlitsbrunnar upp og binda hesar í drenleiðingina.

Arbeiðið skal vera liðugt 1. oktober 2005.

**Høvuðsnøgdirnar eru áleiðis:**
- grava og fylla veit 1610 m3
- brekka, skjóta og fylla veit 450 m3
- leggja drenleiðing 2516 m
- leggja sterkstreymskaðal 2516 m
- uppsetan av vega- og eftirlitsbrunnum 66 stk.

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn týsdagin 7. juni 2005, kl. 11.00.

Ástaðarfundur verður mánadagin 6. juni 2005, kl. 10.00. Møtt verður við tunnilsmunnan oman fyri Norðskála.

**Útbjoðingartilfarið kann bíleggjast frá**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 13 33

frá 24. mai til í seinasta lagi 27. mai 2005 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 2.000, íð verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land